## Eimskip selir burturav

Íslendska flutningsfelagið Eimskip hevur selt einum norskum felagi helvtina av partabrævunum í bingjuflutningsfyritøkuni Euro Container Line. Partarnir kunngjørdu fríggjadagin, at søluprísurin var 712 milliónir íslendskar krónur. Gylfi Sigfússon, forstjóri í Eimskip, segði í tíðindaskrivi í sambandi við handilin, at sølan hevur einki við fíggjarkreppuna í Íslandi at gera, tí hon var avtalað frammanundan. Forstjórin segði, at Eimskip leggur seg framvegis eftir at hava eina sterka støðu í Norðiuratlantshavinum við virkseminum hjá millum annað Faroe Ship.



# Veitarin – nýggjur útbjóðari á San



*Seinnapartin fríggjadagin skipaði Kemilux Industri fyri móttøku í sambandi við, at fyritøkan hevur latið upp handilin Veitaran*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



**Seinasta fríggjadag læt Kemilux Industri nýggjan handil upp í hølunum hjá fyritøkuni á Sandvíkahjalla. Hendan seinnapartin varð eisini skipað fyri móttøku, har viðskiftafólk og fólk annars høvdua høvi at síggja handil og útboð**

HANDIL

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta fríggjadag læt Kemilux upp nýggjan handil.

Veitarin, sum er navnið á handlinum, er tað fyrsta, tú kemur inn í, tá tú vitjar Kemilux og gólvvíddin, har fyritøkan nú sýnir fram sítt fjølbroytta og stóra útboð, liggur um slakar 200 fermetrar.

Frammanundan hevur Kemilux ikki havt nakra skipaða smásølu, men sum tey sjálvi siga, so hava tey ongan koyrt útaftur, sum komin er inn á gólvið. Vøran hevur ikki verið so sjónlig, og viðhvørt hevur tað verið eitt baks at funnið vøruna fram, tí hon í stóran mun hevur ligið á vørugoymsluni.

Nú hevur Kemilux keypt sær snotuliga hyllaskipan, sum er sett upp framvið vegginum, har tú kemur inn, og nú sæst samlaða vøruútboðið nógv betur.

Stjórin í Kemilux Industri, Debes Petersen, sigur, at íløgan í nýggja handilin er upp á einar 400.000-500.000 krónur, men hann væntar samstundis, at felagið við nýggja tilboðnum fer at økja um árliga umsetningin við umleið 2 miljónum krónum.

Á Kemilux Industri arbeiða tilsamans 17 fólk, og at taka sær av sjálvum handlinum hevur felagið sett Gudny Hansen úr Havn.

### Kemilux Sirius

Veitarin hevur fingið undirheitið Kemilux Sirius, og hetta kemst av, at fyritøkan á heysti í 2007 keypti allan partapeningin í smáparta-